# Semjuskjal: Langtíðarsemja um tvíliðaða gjaldsskipan fyri alivinnuna

Eftir ítøkiligar samráðingar síðani seint á heysti 2023 eru samgonguflokkarnir – Javnaðarflokkurin, Tjóðveldi, Framsókn – og Sambandsflokkurin komnir ásamt um eina endurskoðaða skipan fyri gjøld frá alivinnuni. Semja er um at skipanin skal byggja á hesi mál og grundreglur:

- At tað er av týdningi at gera tvørpolitiska semju um eina varandi skipan, ið røkkur tvørturum valskeið og tryggjar landinum eitt rímiligt og rættvíst gjald fyri rættin at ala í Føroyum og vinnuni ein støðugan karm, ið gevur best møguligt grundarlag at leggja virksemið til rættis.
- At skipanin, alt tað ber til, ikki stýrir atferðini hjá vinnuni, tá umræður, hvussu virksemið verður lagt til rættis – undir hesum framleiðslu, virðisøking og íløgur í burðardygga aling.
- At skipanin skal vera so umsitingarliga einføld og gjøgnumskygd sum gjørligt og leggja upp fyri teimum vansum og avbjóðingum, sum kunnu taka seg upp.
- At framd verður ein tvíliðað skipan sett saman av tøkugjaldi og serskatti á yvirskot hjá alifeløgunum.
- At skipanin tryggjar altjóða kappingarføri hjá vinnuni.

**Tvíliðaða skipanin – tøkugjald og serskattur**

Skipanin verður sett saman av ávikavist tøkugjaldi og einum serskatti á yvirskoti hjá alifeløgunum. Harafturat er semja um, hvussu framleiðslukostnaðurin verður ásettur frameftir.

1) ***Tøkugjald***

Tøkugjaldið verður ein stigi, ið byrjar á 0,5% og endar á 7,5%.

➢ Tøkugjaldsstigin verður ásettur soleiðis:
– 0,5% grundgjald, tá prísurin er lægri enn kostnaðurin at framleiða, K
– 2,5% um prísurin er hægri enn ella hin sami sum K, men lægri enn K pluss 5 kr.
– 5,0% um prísurin er hægri enn ella hin sami sum K pluss 5 kr., men lægri enn K pluss 15 kr.
– 7,5% um prísurin er hægri enn ella hin sami sum K pluss 15 kr.

2) ***Serskattur***

Alifeløgini gjalda ein eyka serskatt á 8% av skattskyldugu inntøkuni hjá feløgunum. Talan er um skattskylduga inntøku av virkseminum frá smoltframleiðslu til sjógvaling og tøku.

**Áseting av framleiðslukostnaði**

Framleiðslukostnaðurin verður roknaður og ásettur hvørt triðja ár eftir roknskapartølunum hjá alifeløgunum. Í árunum harímillum verður framleiðslukostnaðurin prístalsviðgjørdur við støði í vanliga prístalinum og fóðurprísunum. Hetta verður gjørt á henda hátt:

a) Ár 1 (2025) verður framleiðslukostnaðurin, K, ásettur við støði í seinastu grannskoðaðu ársroknskapartølunum hjá alifeløgunum.
b) Ár 2 verður framleiðslukostnaðurin prístalsviðgjørdur við støði í prístalinum, ið telur 50% og vøkstri í fóðurkostnaði, ið telur hini 50%.
c) Ár 3 verður framleiðslukostnaðurin prístalsviðgjørdur á sama hátt sum ár 2.
d) Ár 4 verður framleiðslukostnaðurin aftur ásettur við støði í seinast grannskoðaðu ársroknskapartølum frá alifeløgunum.

Fortreytir:

- Tá framleiðslukostnaðurin verður gjørdur upp, er tað uttan sølu- og flutningskostnaðir.
- Framleiðslukostnaðurin verður roknaður sum eitt miðal, soleiðis at hvør alifyritøka vigar ein triðing í uppgerðini.
- Fyri at prístalsviðgera fyri broytingar í fóðurkostnaði skulu feløgini senda inn upplýsingar um fóðurkostnað árliga.

**Onnur viðurskifti av týdningi**

Flokkarnir eru samdir um, at ein skipan, sum tann ið verður skotin upp, krevur at brúka fremstu serfrøði og eftirlitsskipanir og at hetta verður tryggjað við neyðugari fígging og umsitingarligari orku.

Flokkarnir eru samdir um:

- At lóggáva um broyting í tøkugjaldsstiganum og áseting av framleiðslukostnaði verður løgd fram í seinasta lagi í apríl 2024 eftir rímiliga hoyringsfreist, og samtykt í verandi tingsetu.
- At lóggáva um serskattaskipan verður løgd fram í seinasta lagi í oktober 2024 og samtykt innan árslok.

**At tryggja tvørpolitiskar semjur og varandi skipanir**

Flokkarnir ásanna, at vit ikki hava nógv fordømi um ella siðvenjur fyri, hvussu tvørpolitiskar semjur verða gjørdar, so at tær halda í langtíðarhøpi og tvørturum valskeið.

Flokkarnir eru tí samdir um hetta grundarlag fyri semjuni:

- Nýggja skipanin við tøkugjaldi og einum serskatti fær gildi 1. januar 2025.
- At semjan verður varandi í stytsta lagi til 2032.
- At um heilt serlig viðurskifti taka seg upp, sum broyta fortreytirnar, viðgera flokkarnir semjuna og skipanina í felag.
- At tillagingar og broytingar kunnu gerast, um allir semjuflokkarnir eru samdir um tað.
- At um flokkur ella flokkar vilja taka seg úr semjuni eftir 2032, skal hetta fráboðast við í stytsta lagi 6 mánaða freist, og broytingar kunnu ikki fremjast fyrr enn eftir, at Løgtingsval hevur verið.

Tórshavn, 26. mars, 2024

| Vegna Javnaðarflokkin | Vegna Sambandsflokkin | Vegna Tjóðveldi | Vegna Framsókn |
|---|---|---|---|